LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

# Psykiatriski depilin skipar fyri temadegi

**Evni:** Sexualitetur hjá fólki við menningartarni.

**Undirvísari:** Anette Løwert, sálarlækni og kliniskur sexologur. *Anette Løwert er serkøn í sálarligum trupulleikum hjá fólki við menningartarni (oligofrenipsykiatri). Anette Løwert hevur arbeitt við hesum í mong ár og er tilknýtt Psykiatriska depilinum sum serkunnleiki á økinum.*

## Innihald:

**Menning av seksualiteti:**
Fasurnar hjá Freud og tann sálarliga, sosiala og seksuella menningin.

**Seksualiteturin ávirkast av:**
Mentan, uppaling, royndir hjá tí einstaka og samspæl við onnur.
Hvat ið krevst fyri at fáa eitt gott sekslív:
Seksuellan tørv, vitan, royndir og kenslur.

**Munur á kynum:**
Viðføtt, mentan, samfelag og hin einstaki.

**Frá hvørjum fær ein hjálp:**
Vaksnum, vinum, lækna og starvsfólki.

**Ágangur:**
Ágangur ímóti fólki við menningartarni.
Ágangur framdur av fólki við menningartarni.

**Málbólkur:** Temadagurin er ætlaður starvsfólkum, ið eru um fólk við menningartarni, ið ynskja at menna sín kunnleika um sexualitetin hjá fólki við menningartarni .

**Stað og tíð:** Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, Tórshavn.
Týsdagin 29. mars kl. 08.30 – 16.00.

**Kostnaður:** 1.900 kr. Mat og tilfar íroknað

**Nærri upplýsingar:** um temadagin fáast á Psykiatriska deplinum frá Dagmar í Heiðunum, teldupost lsdaghe@ls.fo. Avmarkað luttakaratal.

**Tilmelding:** Teldupost lsdaghe@ls.fo í seinasta lagi 10. mars 2011

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# Vísindastarvsfólk í søgu á Fróðskaparsetri Føroya

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í søgu leyst at søkja. Tann, ið sett/ur verður, skal serliga virka fyri at menna gransking og útbúgving í søgu á Fróðskaparsetrinum.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður knýttur at serøki umsøkjarans, men umsøkjarin skal eisini vera sinnaður at granska í føroyskari søgu. Samstarv við aðrar mentanarstovnar og onnur fakøki innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um ábyrgd av søgupartinum í útbúgvingum á setrinum, eisini teimum sum útbúgva seg sum lærarar og teimum sum fáa sær eftirútbúgving.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving í søgu helst hava granskingarførleika á lektarastigi og hollar undirvísingarroyndir. Umsøkjarar, sum hava Ph.D.- ella lektaraførleika og sum hava granskað í føroyskari søgu, hava fyrimun. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevnir.

Við umsóknini skulu, umframt CV og lýsing av egnum granskingarprofili og framtíðarætlanum umsøkjarans við starvinum, eisini fylgja yvirlit yvir øll vísindalig avrik umsøkjarans. Tey bestu 10 vísindaligu avrik umsøkjarans skulu leggjast við umsóknini í fýra eintøkum.

Starvið verður sett í samsvar við førleikameting hjá metingarnevnd og ein setanarnevnd gevur rektaranum tilmæli um, hvør setast skal.

**Umsókn**
Umsóknarfreist er 7. mars 2011.

Starvið verður sett 1. mai 2011 ella skjótast til ber.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til dekanin Hans Andrias Sølvará, tlf. 352583/292581, hansas@setur.fo ella til rektaran, Jóan Pauli Joensen jopajo@setur.fo 352503/292503.

Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (CV), vísindaligum avrikum og lýsing av granskingaprofili og framtíðarætlanum v.m. skulu sendast til:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**

LEYGARDAGIN ER OPIÐ TIL KL. 16
TUNNILSDAGUR!
KOM & GER KVETTIÐ
VEGNA BROYTING SKULU ALLAR GARDINUR ÚT
-75%
Skálabúðin
Dr. Jacobsensgøta 21, tel. 315 315
Sosialurin 341800